# Farmaskip inn í havnina

**Leirvík:** Bygdarráðið hevur nú samtykt, at Leirvíkar Havn skal hava eina sonevnda ISPS-góðkenning.

Lógin um verju av havnum varð sett í gildi í 2004. Lógin krevur, at farmaskip 500 BT ella meira, bert kunnu koma inn í havnir, sum hava eina sokallaða ISPS-góðkenning.

Fyri at fáa havnina góðkenda, skal ein váðameting gerast, eins og ein verndarætlan sambært kunngerðini um verju av havnum.

– Tá ið Landsverk hevur góðkent havnina, kann Leirvíkar Havn taka ímóti øllum farmaskipum í framtíðini, verður sagt.

**sb.**

# Nýtt miðstaðarøki í Havn

**Hoyvík:** Á býráðsfundið í farnu viku samtykti Tórshavnar kommuna at taka undir við uppskotinum til byggiskipan og serstaka byggisamtykt fyri Karlamagnusarbreyt.

Henda gongur í stuttum út uppá, at økið skal gerast til eitt miðstaðarøki, ið skal hýsa handlum, skrivstovuvirksemi, stovnum, samkomuhølum, list og aðrari mentan. Ætlanin er at har skulu verða íbúðir og vinnuvirki, sum hóska seg at liggja saman við bústøðum.

Ynskiligt at gera eina miðstaðargøtu, har fólk fara at trívast. Tí skulu parkeringsøkini ikki gerast ov stór, so hesi ikki gera frástøðurnar millum bygningarnar fram við Karlamagnusarbreyt ov stórar.

Ætlanin er, at hetta skal verða ein seyrigøta. Tað merkir, at hon ikki er ætlað til skjóta og gjøgnumkoyrandi ferðslu. Harafturímóti er ætlanin, at gangandi og koyrandi, ið hava ørindir í økinum, verða raðfest hægst.

**sb.**

# Felagshús gerast við ítróttarøkið

**Norðragøta**: Á seinasta fundinum í bygdaráðnum í Gøtu varð samtykt, at at ein serstøk projekt-nevnd skal setast.

Henda nevndin skal kanna, hvat tað fer at kosta at gera eitt nýtt felagshús við ítróttarøkið í Norðragøtu.

Í hesi nevndini sita seks umboð, har m.a. kommunan hevur tvey og Gøtu Ítróttarfelag tvey.

Á bygdaráðsfundinum varð samtykt, at hendanevndin fær heimild at nýta upp til 150.000 kr. til at tekna, kostnaðarmeta, gera uppskot um figgingarmynstur og rakstrarætlan.

**sb.**

# Evnisdagur um havfisking

**EVNISDAGUR**
*tíðindaskriv*

Sum liður í menningini av føroyskari ferðavinnu innan havfisking, skipar Ferðaráð Føroya fyri evnisdegi við heitinum »Havfisking í ferðavinnuhøpi« á Parnassinum á Hotel Hafnia tann 31 mars 2006.

Endamálið við degnum er, at varpa ljós á havfisking í Føroyum sum sølutilboð í ferðavinnuhøpi, og vendir sær til øll, sum á ein ella annan hátt hava tilknýtið til evnið, bæði frá privatari, eins væl og almennari síðu.

Viðgjørd verða ymisk viðurskiftið, sum stinga seg upp í samband við sigling við ferðafólki, um fiskitúrar og tilhoyrandi loyvir, tryggingar og reinførisvegleiðingar o.s.fr.

Umframt hetta verður høvið at fáa kunning um havfiskifestivalin, sum verður hildin í Føroyum í august 2006. Umboð fyri útlendska ferðaskrivstovu verða eisini til staðar og greiða frá teirra tilboðum, hvørji tænastukrøv teirra kundar seta í samband við havfisking og hvørjar møguleikar teir síggja í Føroyum.

# KROSSORÐ




**Vinnari:**

*Maria L. av Steinum*
*Ósabakki*
*410 Kollafirði*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: RUNUKAKUR

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| R | U | T | U | F | L | O | G | F | A | R | | F | Á | I | R |
| A | N | D | R | A | S | S | | R | U | N | D | A | R | | E |
| M | G | | I | N | D | A | R | I | | | | Ð | | G | Y |
| A | A | | | G | | R | U | Ð | U | L | E | I | K | I | N |
| D | R | I | V | I | N | | T | U | N | N | U | R | | M | S |
| A | | L | E | N | I | N | | R | G | | R | I | | S | M |
| N | I | L | S | | | E | B | | A | R | O | N | | T | Ú |
| 454 | C | K | | T | B | | R | Ó | P | | P | | V | E | L |
| C | H | E | G | U | E | V | A | R | A | | A | P | P | I | A |
| O | | N | I | | I | | K | A | R | | | I | | N | L |
| N | A | N | S | E | N | | | | | O | N | D | | | Á |
| C | H | I | N | A | T | O | W | N | | K | | D | O | R | G |
| O | | N | A | | A | R | A | B | I | S | K | I | | U | |
| R | U | G | | R | | V | N | | I | I | I | | U | N | G |
| D | U | | F | Ó | R | | D | M | | | E | I | N | A | R |
| E | U | R | O | P | A | S | A | M | V | E | L | D | I | | Á |

**Hvønn fríggjadag**
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagátu nr. …« á bjálvan.

**Loysunarorðið:** ........................................ **455**

Navn: ........................................................

Bústaður: ..................................................

Bygd/býur: ................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** – *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** – *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***